ítróttur

Nr. 177 • fríggjadagur • 19. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Julian er komin í steypafinaluna



*Julian Johnsson, sum her sæst tørna út fyri føroyska landsliðið, er nú komin í íslendsku steypafinaluna*

**ÍA Akranes vann mikukvøldið sannførandi sigur í hálvfinaluni ímóti Akureyri og skal spæla finalu ímóti FH av Hafnafriði**

ÍSLAND ÚTISETI
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Síðsta umfarið í Landsbankadeildini, sum besta fótbóltsdeildin í Íslandi verður nevnd, er á skránni í vikuskiftinum. Tá skulu Julian Johnsson og liðfelagarnir verja næstfremsta plássið í Vestmannaoyggjunum.

Annað málið hjá ÍA, sum kom illa frá fyrstu umførunum í landskappingini, er at vinna silvurkrónur. Hitt málið er at vinna steypakappingina. Mikukvøldið tryggjaðu teir sær finalupláss. Finalan verður á Laugardalsvøllinum í Reykjavík annað vikuskifti. Tá skal ÍA spæla ímóti FH av Hafnafirði, sum næstsíðsta mikukvøld vann hálvfinalu á Laugardalsvøllinum 3–2. Mótstøðuliðið hjá FH var meistaraliðið úr KR.

Hálvfinalan hjá ÍA var á Laugardalsvøllinum ímóti KA av Akureyri. ÍA var leikliga omaná alla tíðina, men tað var ikki fyrrenn eftir steðgin, at teir fingu málini og vunnu 4–1.

Ferðin var stór, skotroyndirnar vóru nógvar, men neyvleikin var ikki altíð so stórur. Kári Steinn Reynisson skoraði tvey tey fyrstu ÍA málini. Tað fyrra stútaði hann longu í 46. minutti, og tað seinna skoraði hann við langskoti, tá ið seinna umfarið var sjey minuttir gamalt.

Tveir minutti seinni økti Garðar Gunnlaugsson til 3–0, og so var tað greitt, hvør skuldi halda fram í finaluni. Í 56. minutti misti KA Slobodan Milisic, sum dómarin metti hava taklað so ófantaligt, at tað átti at kosta reytt kort. Tríggjar minuttir seinni minkaði Elmar Dan Sigþórsson um munin, men KA kom ongantíð nærri. Teir royndu at trýsta, men tað var Garðar Gunnlagusson sum í síðstu løtu staðfesti trivaliga sigurin hjá teimum á Akranesi.

Tá ið ÍA fer á Laugardalsvøllin næsta vikuskifti verður tað átjanda ferðin, at teir skulu spæla finalu. Higartil hava teir vunnið steypakappingina átta ferðin. Síðsti sigurin var í 2000.

Julian Johnsson verður næsti føroyingurin, sum fer at umboða Akranes í steypafinaluni. Tann fyrsti var Uni Arge, sum var á ÍA liðnum, ið 24. september í 2000 vann finaluna ímóti ÍBV 2–1. Í 1999 vóru Jens Martin Knudsen og Uni Arge á liðnum hjá Leiftri, sum á Laugardalsvøllinum tapti steypafinaluna ímóti júst ÍA.

# Vejle tapti enn eina ferð

**Heldur ikki Fremad Amager fekk nakað burtur úr hesum umfarinum, og nú liggja bæði tey føroysku feløgini í tyngra endanum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Mikukvøldið vóru Christin Høgni Jacobsen og liðfelagarnir í Vejle norðuri í Randers. Har gekk tað væl í 1. hálvleiki. Í steðginum var støðan 2–2, men eftir hvíldina vóru heimamenninir greitt omaná, og Randers FC vann 4–2. Christian Høgni Jacobsen, sum hevði stútað mál í tveimum dystum á rað, var hesa ferð ikki millum Vejle málskjúttarnar.

Fremad Amager, sum Jann Ingi Petersen fer at umboða um nakrar fáar vikur, hevði heldur ikki eydnuna við sær. Teir vóru í Sønderborg, har HFK Sønderjylland vann trivaligan 4–1 sigur.

Í toppinum vann Horsens aftur. Hesa ferð gekk tað út yvir Fredericia, sum varð sent til hús við 1–0 tapi. Ølstykke, sum hevur staðið seg rættuliga væl, tapti 4–3 á heimavølli ímóti Køge, sum hevði nýggjan venjara.

Á Eysturbrúgv var 2–2 ímillum grannafeløgini B93 og Skjold, og fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum eydnaðist tað Brønshøj at fáa stig. Á heimavøllinum í Tingbjerg í Keypmannahavn vunnu teir 2–1 á B1913 úr Odense.

Nykøbing Falster Alliancen, sum so fegin vil sleppa longri upp í donskum fótbólti, fekk aftur eitt skot fyri bógvin. Hesa ferð taptu teir á heimavølli 1–0 ímóti FC Nordjylland. Tað varð ikki mett at vera nakað serligt úrslit.

Vejle er framvegis á 11. plássinum, og Fremad Amager er nummar tíggju.



# FCK vassaði í møguleikum

**Í síðstu løtu eydnaðist tað at javna í Viborg, og í yvirtíðini misnýtti innskifti Todi Jónsson gyltan møguleika at skora sigursmálið**



*Todi Jónsson hevði risamøguleika at tryggja sigurin móti dystarenda, men saman við liðfeløgunum mátti hann bara iðra seg um, at hetta miseydnaðist*

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum var Todi Jónsson mikukvøldið ikki millum teir fyrstu ellivu á FCK liðnum, sum spældi 2–2 í Viborg. Hann varð settur á vøllin, tá ið ein lítil hálvur tími var eftir, og tað var um reppið, at Todi gjørdist hetjan á FCK liðnum. Í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, var hann á rætta staðnum, tá ið eisini innskifti Peter Møller (fyri Erik Mykland í 71. minutti) lyfti høgt úr vinstru og til handara stólpan. Todi rakk akkurát fram, men ein hálvan metur frá baklinjuni og eitt vet handan stólpan brast bólturin í uttaru síðuna á stólpanum, tá ið Todi við høgru innarusíðu royndi at flukta í púra tóma málið.

At Todi Jónsson ikki var millum teir fyrstu ellivu komst av, at Hans Backe hesa ferð hevði gjørt av, at nýggi brasilski spælarin, Álvaro Santos, skuldi vera undir liðini á Zuma. Samanspælið teirra millum tóktist ikki at vera so galið, men hvørgin teirra kom á málskjúttaralistan, sum er týdningarmiklasta vektin, ið álopsspælarar verða vigaðir á.

Hóast FCK leikliga var omaná so at siga alla tíðina, so mundi uppgerðin kennast sum støðug mótbrekka. Søren Frederiksen, ið er tann spælarin, ið hevur skorað flest mál tilsaman í superliguni, sum nú er ellivu ára gomul, setti longu í 2. minutti hol á fyri Viborg, tá ið hann sendi fríspark í málið.

FCK royndi og roynd at spæla, og aftaná metti venjarin hjá teimum, Hans Backe, at hansara lið hevði havt fjúrtan upplagdar málmøguleikar. Men tað var ikki fyrrenn ein tími var farin, at Thomas Røll skoraði upp á brotssparkið, sum hann sjálvur hevði fingið.

So var lagt upp til, at Viborg skuldi verja javnleikin, men bara tríggjar minuttir seinni vóru teir aftur frammanfyri. Við dundurskotið úr 16 metrum skoraði Christian Magleby, sum í summar kom til Viborg, eftir at hann í vinstru hevði sneitt framvið fleiri mótstøðumonnum.

FCK royndi og roynd, og í síðstu løtu í vanligu leiktíðini eydnaðist tað liðformanninum og stríðsmanninum á miðvøllinum, Peter Nielsen, at javna, tá ið hann mitt fyri setti framvið sera tryggja Viborg málverjanum.

Hetta var aðru ferð á rað, at meistararnir úr Keypmannahavn bara fingu eitt stig burturúr. Tað kemur ikki ofta fyri hjá teimum. Men tað plagar at vera torført hjá teimum í Jyllandi, so kanska vóru teir kortini ikki heilt misnøgdir við úrtøkuna. Leikliga avrikið segði venjarin seg vera heilt væl nøgdan við. Og so hevði tað verið sera hugaligt, um Todi Jónsson, sum hesa ferð varð settur í skuggan av nýggja spælaranum, hevði verið hepnari í síðstu løtu, enn hann var tað hesa ferð.

# Brøndby er framvegis oddalið

**Men tað var ikki eftir bókini, at teir á heimavølli bara fingu eitt stig burturúr ímóti AaB, sum higartil hevur staðið seg illa**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Nú er nakað síðani, at Jón Rói Jacobsen var í fimtan manna hópinum hjá Michael Laudrup. Síðani UEFA Cup ferðian til Hvítarussland hevur Jón Rói einans verið á talentliðnum, og mikukvøldið, tá ið Brøndby hevði vitjan av AaB, var heldur ikki pláss fyri Jón Róa millum teir bestu. Laudrup hevur síðstu tíðina roynt at fáa Brøndby viðhvørt at spæla 3–4–3 í staðin fyri 4–3–3, sum liðið hevur spælt síðsta árið. Tað er kortini ikki púra upplagt, at hetta skal skaða møguleikarnar hjá Jón Róa. Heldur er tað veruleikin, at har eru fleiri góðir spælarar, sum hann kappast við. Ikki minst hevur svenski Andreas Jakobsson staðið seg framúr væl, síðani hann fyrr í summar kom úr Hansa Rostock og til Brøndby.

Brøndby er oddalið í superliguni eftir átta tey fyrstu umførini. Mikukvøldið megnaðu teir kortini bara 1–1 á heimavølli ímóti AaB, og tað vóru teir ikki nøgdir við. Michael Laudrup ásannaði aftaná, at hesa ferð høvdu teir leikliga ikki víst tað, sum teir eiga at megna. AaB skifti í síðstu viku venjara. Nýggi venjarin, Søren Kusk, fekk trý stig burturúr fyrstu royndini, sum var á heimavølli sunnudagin, og at fáa eitt stig burturúr í Brøndby er sjálvandi óført hjá felag, sum mest hugsar um at sleppa burtur frá niðurflytingarstrikuni.

AaB, sum ongantíð hevur vunnið í Brøndby, legði seg framum við brotssparki, og Brøndby javnaði fram ímóti dystarenda. Uppspælið til málið minti nógv um tað, sum B68 vísti, tá ið teir skoraðu sigursmálið ímóti NSÍ!

Eftir vónbrotið í Odense sunnudagin nýtti Esbjerg høvið at leggja seg upp á síðuna av Brøndby, tá ið teir á heimavølli vunnu sannførandi 2–0 sigur á Frem, sum ikki hevði nógv at bjóða uppá, og sum nú hevur tapt tvær ferðir upp í slag.

FCM megnaði ikki at fáa tað burturúr, sum tað kundi roknast við, tá ið tað var botnliðið, FC Nordsjælland, sum var mótstøðulið. Gestirnir høvdu meiri spæl, og venjarin hjá teimum, Christian Andersen, var ikki blíður við sínar menn, sum hann helt høvdu fingið alt ov lítið burturúr. Úrslitið var 1–1.

OB eisini meiri enn hálvsnávaði ímóti einum av teimum í niðara endanum. Teir vóru í Herfølge, har heimaliðið hevði nógvar møguleikar at skjóta mál og vinna. Úrslitið gjørdist 2–2.

Eftir sera tunga gongd í fyrstu umførunum hevur AGF lætt sær upp í miðjuna. Mikukvøldið høvdu teir vitjan av AB, sum mánadagin fekk nýggjan venjara. Henrik Jensen, sum í síni tíð spældi í Hvidovre og síðani í Brøndby, har hann var partur av góða liðnum fyrrapartin av níti árunum, er nýggjur maður við AB róðrið. Hann hevur higartil verið venjari hjá Køge, sum flutti niður í summar, og sum nú er í sovornum fíggjarligum óføri, at teir ikki hava ráð at rinda avráddu lønirnar.

AB fekk ikki tað burturúr við nýggjum venjara, sum eitt nú AaB hevur fingið síðstu dagarnar. AGF vann 2–0, og tað var fyrrverandi FCK álopsspælarin Thomas Thorninger, sum seinnapartin av 1. hálvleiki skoraði bæði málini.

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 13 | 4 | 9 | 17 |
| 2 Esbjerg | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 15 | 8 | 7 | 17 |
| 3 OB | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 14 |
| 4 FCK (M) | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 14 | 9 | 5 | 14 |
| 5 FCM | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 12 | 10 | 2 | 14 |
| 6 Viborg | 8 | 2 | - | 4 | - | 2 | 13 | 14 | -1 | 10 |
| 7 AGF | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 11 | 15 | -4 | 10 |
| 8 Frem | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 8 | 12 | -4 | 9 |
| 9 AaB | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 6 | 9 | -3 | 8 |
| 10 Herfølge | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 7 | 11 | -4 | 7 |
| 11 AB | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 7 | 16 | -9 | 7 |
| 12 FC Nordsj. | 8 | 1 | - | 3 | - | 4 | 8 | 11 | -3 | 6 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)